# Tórshavnar Báta-felag aðalfund

Á aðalfundi hjá Tórshavnar Bátafelag herfyri varð nevndin afturvald - við einum undantakið. Petur Jensen ynskti ikki afturval. Jegvan Bæk, sum higartil hevur verið tiltakslimur, bleiv valdur í nevndina. Uppskot var komið at velja Unu Højgaard sum nýggjan tiltakslim, og tað bleiv einmælt samtykt. 6. mai skipaði nevndin seg við Kartna Olsen sum formanni, Øssuri Hjalt sum næstformanni, Alva Nielsen sum kassameistara og Jógvan Bæk sum skrivara. Nevndarlimur er Jóannes Joensen. Tiltakslimir eru Anfinn Norðfoss og Una Højgaard. Felagsins árliga stóra tiltak stendur fyri framman: tann sera vælumtókti bryggjudansurin í Vágsbotni. Hann verður leygarkvøldið tan 26. juli, og nevndin sigur, at hon longu er væl ávegis við fyrireikingunum.






















